Fra: Sp/f Røkt
Til: Umhvørvismálaráðið
Cc: Sp/f Røkt; kristvor@umhvorvi.fo
Emne: Viðmerkingar til uppskot um broytingar í elveitingarlógini
Dato: 5. februar 2024 22:34:28

Viðmerkingar frá Sp/f Vindrøkt til uppskot um broytingar í elveitingarlógini

Til broyting nr. 6
Við hesi broyting krevst loyvi frá Orku til alt vinnuligt elframleiðsluvirskemi (omanfyri 11kw, sum er sera avmarkað, og svarar umleið til ein 380 part av einari myllu á Gellingarkletti og umleið ein 80 part av einari myllu í Húsahaga).

Slík broyting vil verða ein skerjing í virkis- og vinnufrælsinum hjá aktørunum, uttan at tað er neyðugt við hesum lógarkravi um loyvi. Onki er í uppskotinum, sum vísr, at slík meirregulering er neyðugt ella gagnlig.

Hartil verður § 4 galdandi fyri alt loyvisvirksemi, men uttan at nøkur rættindi verða tryggjað aktørunum, tí grein 4 er so vítt orðað og harvið vil myndugleikin virka innan sera víðar heimildir tá avgerð skal takast um at geva loyvi ella ikki.

Var t.d. talan um bygging og byggiloyvi, so er givið framamnundan, at heldur tú ávísar ásetingar, so hevur tú krav um loyvi. Her er støðan øvugt, tí nú ger myndugleikin innan serstakliga víðar rammur av. Tað er hvørki nøktandi ella ráðiligt.

Mælt verður tí til at sleppa hesi broytingini.

Til broyting nr. 7
At skula áleggja aktørum at samstarva um síni framleiðsluøki er víttfevnandi og ikki neyðugt út yvir tað, sum er ásett í galdandi lóg um savningarøki v.m.

Til broyting nr. 8
Við hesi broyting verður, umframt at lýsingarfreistin undir open door verður trífaldað, kravið um alment útboð víðkað til at kalla alla orkuframleiðslu.

Hetta stimbrar ikki undir, at verkætlanir kunnu verða mentar og framdar uppá privat initiativ, tí tá ein verkætlan er ment má søkjast um loyvi og so byrjar eitt útboð, har ein annar væl kann verða lægstur og vinna útboðið, heldur enn at umsøkjarin kann fáa loyvi til sína verkætlan, um henda annars er skilagóð.

Tá eginframleiðsla verður undantikin kravinum um útboð eigur hugtakið eginframleiðsla at verða nágreinað betri, so at greitt er, hvat hetta fevnir um. Nágreinast eigur tí, at eginframleiðslu m.a. fevnir um tá ein aktørur framleiður el úr vindorku og síðan nýtir sína elorku til víðari framleiðslu av til t.d. brint, metanol ella øðrum, fyri síðan at selja brintið og metanolið v.m. til brúkarar, vinnu og onnur.

Til broyting nr. 15
Við einum lógarkrav sum § 15d um, at fjarhitavirksemi skal hvíla í sær sjálvum, er

útilokað, at privat feløg kunnu taka lut í ella standa fyri fjarhitavirksemi. Leikluturin hjá privatum aktørum verður tá avmarkaður til einans at kunna selja t.d. el til eitt fjarhitafelag. Slík lógaráseting eggjar tí ikki til menning og stimbrar ikki undir kapping, sum vanliga er brúkaranum at frama.

Tí verður mælt til at strika kravið um, at fjarhitavirksemi, sum ikki er ogn hjá ella verður rikið av kommunum, interkommunalum felagsskapið ella felag, sum hesi eiga, skal hvíla í sær sjálvum.

Til broyting nr. 17
Í sambandi við krav um áringskanningar og at hesar skulu góðkennast, so átti at verið nærri ásett, hvat slík kanning eigur at fevna um og eftir hvørjum leisti meting og góðkenning skal viðgerast eftir, so at gjøgnumskygni, forútsigiligheit og harvið rættartrygd er í, í mun til, hvørjar treytir kunnu verða settar aktørunum og nær ein kanning eigur at verða góðkend.

Til broyting nr. 18
Um talan er um tíðar- ella kostnaðarkrevjandi tiltøk, eigur at verða viðgjørt, hvussu hetta verður fíggjað, tí tað er ikki rímiligt eftirfylgjandi at leggja ein meirkostnað ella meirskyldu á framleiðandi aktørar, um hesir ikki kunnu leggja kostnaðin á prísin.

Til broyting nr. 22
Við § 22b fær myndugleikin eina sera víttfevnandi ognartøkuheimild at ognartaka 1) privata ogn, 2) rættindi til privata ogn og 3) rættindi til almenna jørð/festijørð.

Sambært uppskotinum, nr. 22, samanhildið við hinar broytingarnar, verður framd ein munandi miðvíst sentral stýring av øllum elorkuframleiðsluvirksemi og teim avtalum v.m., sum har til hoyra, við at myndugleikans leiklutur verður styrktur heilt munandi og har at kalla onki kann verða sett í verk uttan at orkumyndugleikin hevur givið sína góðkenning og at orkumyndugleikin hevur møguleika fyri at siga nær og hvar ein verkætlan skal fremjast.

Hetta er alt ov víttfevnandi regulering og alt ov víttfevnandi heimildir og myndugleiki at leggja einum myndugleika. Tá er tann avmarkaði møguleikin, sum er í lógini í dag fyri at kappast gjørdur nærum til onkis. Slíkt er ikki brúkaranum og lægri elprísum at frama.

Ognartøka skal sjálvandi verða allar seinasti møguleiki, sum tikið verður til, men ognartøka skal undir ongum umstøðum vera heimilað, um ein aktørur eigur ella hevur rættindi til eina ogn (almenna ella privata), og hesin rætindahavari hevur ætlanir við økinum, sum kunnu realiserast innanfyri rímiligt áramál. Tað er onki endamál hjá tí almenna at royna at yvirhála privatar aktørar á einstøkum stað, ella at umfordeila rættindi, men eigur tað almenna halda seg til at tryggja hóskandi karmar og annars eina nøktandi framdrift á økinum.

Tað er hartil hvørki rætt ella rímiligt, at ein orkumyndugleiki/landsstýrið skal kunna ognartaka rættindi, sum eru tengd at almennari festijørð, tá ognartøkuheimildin annars ikki røkkur til at taka festijørð. Tá er rættari, at øll viðurskifti viðvíkjandi festijørðini verða greidd av viðkomandi jarðarfyristing, soleiðis sum gjørt verður í dag.

Mælt verður tí til at avmarkað heimildina í § 22b munandi við atlitið til omanfyristandandi. Hartil eigur at verða beinleiðis ásett, at ognartøka ikki kann verða sett í verk um ein ognari ella rættindahavari sjálvur hevur ætlanir við økinum, tí orsøk er ikki hjá tí almenna at taka

yvir ella at koma uppí málið eisini í slíkum føri.

At enda skal verða viðmerkt, at tað er bæði óheppi og beinleiðis skeivt um tað í einum lógaruppskoti/serligum viðmerkingum verður víst til teir prísir, sum almenna jarðarfyrisitingin krevur sambært kunngerð tá almenn festijørð verður seld ella leigað út. Talan er her um ein av eigagaranum uppsettan príslista fyri, havt eigarin vil hava fyri at selja ella leiga út. Tað hevur onki við marknaðarvirði ella veruliga virðið á viðkomandi ogn ella rættindum at gera. Enn minni er hetta galdandi tá talan er um privata jørð.

Nevnda kunngerð um prísir frá almennu jarðarfyrisitingini hevur tó seinastu árini stundum elvt til ta óhepnu avleiðing, at øll kommunal keyp av lendi uttan víðari verða príssett til í minsta lagi sama prís sum almenna festijørðin sambært nevnda katalogi – uttan mun til veruliga virðið, sum væl kann verða undir prísin á festijørð. Hetta eigur tí avgjørt ikki at verða ført víðari við at inndraga nevndu prísir í, hvat rindast skal fyri privata jørð ella rættindi til privata jørð, sum verður nýtt til elframleiðslu. Tað eigur at vera upp til partarnar og marknaðin at finna út av.

Vinarliga

Jóhan í Niðristovu, stjóri